DAGSINS MEINING

Eitt mennandi og lærandi frítíðarítriv!

Tað er einki yvir at dylja, at skótarørslan, ella skótalívið, hevur havt týdning fyri mangan drongin, manga gentuna ella unglingin her á landi. Tað sást og hoyrdist henda dagin, tá elsta skótaliðið í landinum hevði mekisdag. Har vóru minni og søgur at hoyra, og øll høvudu bara tað besta at bera tíðini sum skóti.

Í síðstu viku fylti elsta skótaliðið í landinum, Skótalið Sigmunds Brestissonar, 80 ár. Dagurin varð hildin við móttøku og eini veitslu fyri skótar og gamlar skótar. ”Einaferð skóti – altíð skóti” er eitt hugtak, skótar brúka, og tað er lítið at ivast í, at tann, sum hevur havt eina góða skótatíð, hevur oftast fingið okkurt gott í beini.

I dag er tað kanska ikki ”in” at vera skóti, men tað var tann tíð, tá skótanir taldust millum tey stóru og mest spennandi frítíðarítrivini her á landi – í hvussu er í høvuðsstaðnum og í nøkrum av teimum størru bygdunum. Tá var so at siga eingin ítróttur um veturin. Ongar hallir vóru uttan fimleikahallir í størru plássunum, og bara í høvuðsstaðnum var virkið fimleikafelag.

Men tað er ikki øll, sum íðka ítrótt, og hjá hesum bólkum er skótalívið ein góður møguleiki, men tá tað er sagt, skal leggjast afturat, at nógv av teimum, sum hava verið virkin sum skótar hava eisini verið millum okkara fremstu ítróttarfólk. Tað veri seg bæði innan fótbolt, hondbolt, fimleik, borðtennis, badminton og svimjing.

Onkuntíð er sagt, at skótarørslan hevur kanska ikki dugað nóg væl at fylt við tíðini og menningini. Um tað er rætt ella ikki, er torført at meta um, men nógv av tí gamla skótaarbeiðnum var og kann framvegis vera mennandi fyri tey ungu. Við spæli og lærdómi verður roynt at menna tey ungu, læra tey at loysa støður, arbeiða í felagsskapi, virða síni medmenniskju og vekja ans fyri náttúruni.

Tíðliga læra skótar at taka við ábyrgd sum floksførarar, liðhjálparar og liðleiðarar. Og vit kunnu staðfesta, at mangir leiðarar, stjórar, politikkarar og onnur hava óivað fingið fyrstu leiðsluroyndirnar innan skótarørsluna.

Serliga ”útilívið” hevur eyðkent skótaarbeiðið - í hvussu er fyrr. Gongutúrar, kappingar, vikuskiftislegur og ikki minst summarlegurnar kring landið vóru. Við hesum tiltøkum lærdu skótar sum ungir at ferðast í náttúrini og lærdu landið at kenna. Tær mongu ferðirnar uttanlands, ikki minst altjóða jamboree´irnar, sum eru minnni fyri lívið, skulu eisini nevnast.

Sum alt annað sjálvboðið frítíðararbeiðið hevur skótaarbeiið síni upp- og niðurgonguár. Ofta hava leiðarar skorta, ikki minst á bygdunum, og hetta hevur eisini ávirkað Skótalið Sigmunds Brestissonar. Men hevur tað staðið illa til, hevur onkur altíð tikið eina hond í, og fingið gongd á aftur, og skótaliðið, sum nú fór um tey 80 árini, hevur ongatíð liðið stilt.

Tað almenna hevur ikki hjálpt til sum so, men á hesum øki eins og á øðrum økjum, saknaðist ein ungdómspolitikkur áður. M.a. í samband við stuðli til hús og leiðaraútbúgvingar. Higatil hevur so skótarørsluni verið lív lagað. Eisini tí at mong hava lagt lív og sál í hetta mennandi ungdómsarbeiðið. Vit ynskja SSB hjartaliga tillukku og góðan byr!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Kristiligur mentanarpolitikkur

JOHN WILLIAM JOENSEN
Formaður, Norðoya Sambandsfelag

Sambandsflokkurin vil á øllum økjum reka ein framtaksfúsan politikk á kristiligum mentanarstøði, sigur John William Joensen í lesarabrævi

Seinastu tíðani hevur verið stór øsing í samband við tvey mál sum Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt seg til talsflokk fyri. Hesi eru; – skrásett parlag og uppskotið til ríkislógartilmæli um broyting í revsilógini (forboð móti at gera mun á fólki vegna ”kynsliga orientering”).

Tað kristiliga grundstøði

Tað er ikki av ongum at vit í londunum rundan um okkum, eins og her á lándi, síggja kristiligar flokkar verða settar á stovn. Teir stóru politisku flokkarnir og politikarar í heila tikið, hava síðan fyrst í 60-unum kappast um at hálsfevna humanistisku líváskoðanina, og harvið hevur lóggávan í Evropa flutt seg longur og longur burtur frá tí, sum er sambæriligt við eitt kristiligt grundstøði. Vit kunnu eisini staðfesta at hetta als ikki hevur havt undirtøku millum fólk, tí síðani miðskeiðis í 80-unum eru kristiligir flokkar settir á stovn, sum savna hópin av fólki ið kenna seg sviknan av stóru flokkunum.

Men stevnuskrá Sambandsflokksins, har tað í grein eitt stendur, at Sambandsflokkurin vil á øllum økjum reka ein framtaksfúsan politikk á kristiligum mentanarstøði, bindur flokkin at arbeiða út frá einum kristnum mentanarástøði.

Sambandstingmaðurin, Alfred Olsen, sigur tað so væl í eini grein á heimasíðuni hjá Sambandsflokkinum tann 30. august 2005:

”Nógvar royndir eru gjørdar tey seinnu árini, fyri at fáa tað føroyska samfelagið at viðurkenna hjúnalag millum tvey av sama kyni á jøvnum føti við hjúnalagið millum mann og konu, soleiðis sum vit kenna tað í teirri kristnu mentanini. Men vit sleppa ikki uttanum, at ein viðurkenning av samkyndum hjúnalagi merkir tað sama sum ein vanvirðing av tí kristnu mentanini, sum bert loyvir hjúnalagi millum mann og konu. Ein viðurkenning av hesi nýggju mentanini vil tí altíð merkja, at tann kristna mentanin verður vrakað.

Tað ber ikki til at sameina tvær so mótstríðandi mentanir ella lívsáskoðanir, tí við at viðurkenna aðra, vrakar tú hina. Tí mugu vit sum samfelag og tjóð taka støðu til, hvørja mentan vit vilja hava og hvørja vit ikki vilja hava, tí vit kunnu ikki halta til báðar síðir.

Sum løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin, vil eg vera við til at verja um og framhaldandi virka fyri, at Føroyar vera ein kristin tjóð og at tann kristna mentanin og lívsáskoðanin, sum vit fingu handaða frá forfedrum okkara, verður hornasteinurin í tí føroyska samfelagnum, tí eg ivist ikki í, at vit á hesum grundvølli aftur og aftur vilja uppliva Guds signing, bæði yvir land og fólk.”

Hvat lærir skriftin okkum

Vit eiga at leggja til merkis, at ongastaðni í Bíbliuni verður ein maður ella ein kvinna dømd fyri at hava samkyndar kenslur, men tað er gerðin sum verður dømd.

Tað er ikki syndin sum gerð okkum menniskju til syndarar, men vit eru syndarar tí okkara náttúra er syndug, sum skrivað stendur: ”Tann er eingin, sum rættvísur er, ikki ein.” Og hetta er orsøkin til alla neyð og elendigheit í heiminum.

Tað er tí ikki uttan grund, at Bíblian hevur givið okkum boðini. Eg kann nevna nøkur her.

Fimta boð:
Tú mást ikki sláa í hel.
Hvussu nógv menniskju, bæði fødd og ófødd, verða ikki tikin av lívi hvønn einasta dag, og hugsa um alla tað sorg og neyð hetta førir við sær fyri tey sum eftir sita.

Sætta boð:
Tú mást ikki dríva hor.
Hugsi um gongdina seinastu árini har fleiri og fleiri hjúnarløg fara fyri skeyti, har børnini eru teir stóru tapararnir og mugu gjøgnumganga stórar sálarligar trongdir.

Áttanda boð:
Tú mást ikki bera falskan vitnisburð ímóti næsta tínum.

Hetta kenna vit sera væl, at baktala, at spilla hvønn annan út, traðka hvønn annan niður, fyri sjálvi at koma hægri upp.

Hugsi tykkum, um bert hesi trý boðini vóru hildin, so høvdu vit ein nógv, nógv betri heim at liva í. Jú sanniliga lønar tað seg at gera eftir Guds orði. Men tíverri tykist sum um, at menniskjuni í dag halda seg verða so klók, at sjálvt hin alvísi Gud, sum skapti himmal og jørð, verður settur til síðis. Roynt verður at sleppa sær undan at fylgja hansara fyriskipanum við at siga, at Bíblian kann tolkast ein og annan veg. Men spurningurin er, um vit vilja geva okkum undir Guds vilja ella ei.

Orðaskifti undir alt lágmark

Nógv av tí sum hevur verið sagt av teimum sum eru fyri og ímóti hevur verið undir alt lágmark, men tað er eingin ivi um, at eins og í ørðum málum so elvir trýst til móttrýst.

Tó mugu vit taka avstand frá teimum, sum í bløðunu hava tráðkað niður á tey samkyndu og við peikifingri og sjálvtiknum kundskapi hava stemplað hesi, sum syndarar og tað sum verri er. Í Rómarabrævinum 3,22-23 lesa vit: ”... Tí eingin munur er; øll hava syndað, og teimum fattst dýrd Guds.”

Tað er ikki okkara uppgáva sum kristin at moralisera heimin tí skrivtin lærir okkum at eingin av okkum er uttan synd. Hon lærir okkum um gott og ilt men fyrst og fremst lærir hon okkum hvussu vit skulu umsita hesa vitan ella hvussu vit eiga at vera yvir fyri hvørjum øðrum. 1. kor. 8, 1-2-3: ”....kunnskapurin blæsur upp, kærleikin byggir upp; heldur onkur seg vita nakað, so hevur hann aldri vitað nakað, soleiðis sum ein eigur at vita; men tann, sum elskar Gud, er kendur av honum...”

Tað er eingin ivi um, at tey sum arbeiða fyri rættindunum hjá teim samkyndu hava als ikki dugað sær hógv og hava fært seg so ókritiskt provokerandi fram, at hetta hevur fallið mongum føroyingi fyri bróstið. At hetta hevur elvt til eitt harðligt móttrýst frá prestum, samkomuleiðarum og politikarum, var ikki annað enn vantandi.

Men hinvegin hevur nógv av tí sum hevur verið fært fram í bløðunum ímóti teimum samkyndu verið so av lagið at hetta óivað hevur fingið mong til at umhugsa um tað ikki er neyðugt at broyta lógina hesum viðvíkjandi.

Sambandsflokkurin, eins og aðrir flokkar, er bundin av síni stevnuskrá og fer eisini í framtíðini á øllum økjum at reka ein framtaksfúsan politikk á kristiligum mentanarstøði.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Redaktiónssekreterur:
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

Uppseting/prent:
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.